## Norröna farin í dokk

Í hesum døgum er Norröna í dokk í Hamburg, har millum annað umvælingar af stabilisatorunum eru í gongd. Skipið verður aftur í sigling hósdagin í næstu vikuNorröna verður aftur í vanligari sigling millum Føroyar og meginlandið við fráferð úr Føroyum til Bergen og Hanstholm hósdagin 28. februar kl. 17. Íslandssiglingin hjá Norrönu verður tó ikki uppafturtikin fyrr enn 31. mars, boðar Smyril Line frá í tíðindaskrivi.



## Finnur í Stóra Pakkhúsi

Leygarkvøldið verður aftur tónleikakvøld í Stóra Pakkhúsi í Vági. Hesaferð er tað Finnur Jensen, sum er kendur frá bólkinum, Páll Finnur Páll, sum kemur at syngja og spæla. Finnur Jensen hevur verið í Stóra Pakkhúsi fyrr, og tá vóru skoðsmálinum frá áhoyrarunum framúr góð. Og líka síðani tað tónleikakvøldið, hava vitjandi í Stóra Pakkhúsi spurt eftir, nær næsta tónleikakvøldið við Finni Jensen verður á skránni, skriva fyrireikararnir í tíðindaskrivi. Húsið verður opið frá klokkan 22 til 04.

# Føroyum

sent á stovn í einum fremmandum landi langt frá foreldrunum, kann tað gott vera at onkrir trupulleikar verða loystir, men tað er eisini stórur vandi, at tey fáa aðrar trupulleikar, tí tey kenna seg svikin og einsamøll.

- Tí er tað eitt neyðarróp sum vil nakað, táið foreldur standa fram og siga seg vera noydd at senda børn síni av landinum, sigur Ingvald á Kamarinum.

Hann heldur eisini, at vaksandi tjóðskaparrørslan fær ein óhugnaligan dám, tá ið mann samstundis sær, at sosialir trupuleikar verða eksporteraðir.

- Skal Føroyar vera eitt land fyri nøkur fá útvald sterk fólk, spyr Ingvald á Kamarinum.

### Millum bestu skúlar í Danmark

At vera næmingur á Fjordskolen er annað enn at sita við eitt skúlaborð. Millum annað eigur skúlin ein stóran seglbát, sum verður dúgliga nýttur. Tá ið Sosialurin ringdi til Ingvald, var hann staddur úti á Kattegat saman við tveimum næmingum.

- Okkara næmingar eru ofta sterkir í handaligum og praktiskum økjum, og hetta royna vit at styrkja og menna. Í fólkaskúlanum fáa tey bara niðurløg omaná niðurløg, men hjá okkum fáa tey ein stoltleika og gleði, sum gevur teimum yvirskot at læra meira.

Bara nakrir fáir sokallaðir skeivir næmingar í einum vanligum fólkaskúlaklasssa merkja, at lærarin brúkar alla sína orku til teir, og tí gongur núverandi støðan út yvir øll. Tey veiku, tey sterku og lærararnar sjálvar, sigur skúlastjórin í Danmark.

Fjordskolen hevur fingið heiðurin at verða útnevndur millum bestu skúlar í Danmark, og seinasta ár fekk skúlin eisini heiður úr Bretlandi.

- Hetta gleðast vit sjálvandi um, sigur Ingvald. Men tí kennist tað eisini serliga undarligt, at als eingin áhugi er í Føroyum.

### Líkasælan í Mentamálaráðnum

Ingvald á Kamarinum hevur ikki søkt um at seta skúla á stovn í Føroyum, tí hann endiliga vil sleppa at flyta heim.

- Eg havi tað gott niðri og trívist væl í mínum arbeiði, men hesi børnini liggja mær á hjarta, og eg vil gjarna bjóða mín serkunnleika fram.

Føroyska mentanin er øðrvísi enn tann danska, og tí skuldi tað verið upplagt at brúkt ein føroying sum ráðgeva, heldur enn onkran danskara, sum einki kennir til føroyska mentan, heldur Ingvald á Kamarinum.

Hann leggur eisini dent á, at tað ikki ber til at seta serskúla á stovn, uttan at almennu myndugleikarnir fara heilhjartaðir inn í ætlanina.

- Politiski stuðulin skal til, tí hetta er ein langtíðaríløga. Tað ber ikki til bara at seta okkurt fyribils upp, sum so verður tikið frá børnunum aftur. Tað er at gera ilt verri.

- Manglandi áhugin í Mentamálaráðnum kann ikki koma av fíggjarligari stúran, tí tað er ikki dýrari fyri Mentamálaráðið at senda næmingar í serskúla. Mentamálaráðið skal bara gjalda skúlagongdina, meðan Almanna- og heilsumálaráðið skal gjalda fyri sosialu ráðgevingina.

Ingvald er bangin fyri, at sosiali útflutningurin er ein háttur at loysa trupulleikarnar, sum passar føroysku politikarunum væl. Føroysku politikarnir sleppa undan at taka støðu til vanrøktina, tí fólkini flyta.

- Men tað er ikki lekidómur at senda børn og ung til eitt heilt annað land. Hetta er ein síðsti útvegur hjá kroystum foreldrum og ein flýggjan undan ábyrgd hjá politisku- og fyrisitingarligu umsitiningi, staðfestir Ingvald á Kamarinum.

## Umsóknir bíða í Mentamálaráðnum

Ingvald á Kamarinum og onnur úr Fjordskolen skipaðu í Oktober 2007 fyri tiltakið í Miðlahúsinum, har tey kunnaðu um danska skúlan. Í hesum sambandið hevði Sosialurin samrøðu við hann, har hann undraðist yvir tøgnina í Mentamálaráðnum. Olaus Jespersen, leiðari á fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum, segði tá, at ráðið hevði fleiri umsøknir og at hesar fóru at fáa fundarboð »ein av fyrstu døgunum«. Í samband við greinarøð um mammur, sum stríddust fyri at veita børnum sínum nóg góða hjálp í Føroyum, spurdu vit aftur Olaus Jespersen um hetta, og hann greiddi frá at fólka- og løgtingsval vóru komin í vegin, men hann væntaði at málið fór at fáa skjóta viðgerð, nú nýggjur mentamálaráðharri er settur.

Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í Mentamálum, segði við Sosialin sagt, at hetta økið liggur hennara hjarta nær, og hon ætlar at raðfesta hetta høgt. Hon nevnir millum annað, at ein heildarætlan skal leggjast fyri hvørt einstakt barn við serligum tørvi. Men enn er einki konkret tiltak sett í verk.






**Hey Ingvald**

*Eg havi biðið mammu um umbering, men hon vil ikki taka ímóti umberingini. Eg eri glaður fyri, at eg havi teg nú. Eg havi ein góðan dag/kvøld/morgun, tí tú hjálpir mær altíð. Og tað eri eg glaður um. Tú ert altíð har, tá man hevur brúk fyri tær. Eg vil sleppa at hjálpa tær. Eg skyldi tær alt, fyri alt sum tú hevur gjørt fyri meg. Tú gert meg glaðan, tá ið eg eri keddur, og tú dugir altíð at fáa meg at smílast. Eg eri glaður fyri at ganga á tínum skúla.*

**Klemm frá Nikolaj**

# Næmingur rósar Ingvaldi

Fjordskolen leggur stóran dent á samstarv við foreldrini, børnini búgva heima, og foreldrini eru regluliga til fundir á skúlanum. Harumframt hevur byggir skúlin á at skapa tøtt sambond við børnini og geva teimum sjálvsálit og lívsgleði.

- Tað er ikki altíð lætt, men eitt bræv sum hetta gevur styrki at halda fram, sigur Ingvald á Kamarinum. Brævið hevur ein drongur á skúlanum skriva, eftir at Ingvald hevði arbeitt við forholdinum millum mammu og son.